2014

# Landsfundur Føroya Fiskimannafelags
# FORMANSFRÁGREIÐING



**Føroya Fiskimannafelag**
Bryggjubakki
14---16
Tlf 356000 ella 311569
info@fiskimannafelag.fo
www.fiskimannafelag.fo

| | |
|---|---|
| Inngangur | 3 |
| Er okkara Løgting fyri okkum øll? | 4 |
| Fiskimálaráðið og Vørn | 5 |
| Tvørlig rættarskipan | 7 |
| Anita | 8 |
| Fyrrverandi formaður móti FF | 9 |
| Kartellið DPPO | 11 |
| Samráðingar | 12 |
| Trygd á sjónum | 14 |
| Tilfeingisgjaldið | 15 |
| Eftirløn | 15 |
| Samanhaldið er okkara styrki | 16 |
| Trygdargrunnur Fiskivinnurnar | 16 |
| Inntøkur fiskimanna | 19 |
| Gongdin í daginntøkuni | 22 |
| Gongdin í veiðusamanseting | 23 |
| Gongdin í ísfiskaveiðuni | 24 |
| Ráfiskaprísir | 27 |

# Inngangur

Góðu fiskimenn. 2014 er um at vera runnið. Sum vanligt er tað ymiskt, hvussu tað hevur gingist. Tað hevur aftur í ár verið eitt gott ár hjá uppsjóvarflotanum. Men tað merkir ikki, at alt bara er ein dansur á rósum, tí ein stórur partur av inntøkuni verður nú tikin frá teimum við einum sonevndum tilfeingsgjaldi. Hetta gjaldið fer beinleiðis til at fíggja sersømdir hjá fólki, eitt nú fólki við tænstumannaeftirløn. Í áratíggjur hava allir borgarar í Føroyum fíggjað ágóðar hjá bólkum, sum ikki sjálvir hava skula spart upp til hesar ágóðar. Tænastumannaeftirlønirnar eru bara eitt dømi. Ikki tí, hesum bólki skal eisini vera væl unt at fáa eftirløn, men hann kundi, sum aðrir løntakarar, sjálvur spart upp til hana. Í øllum førum er betri brúk fyri pengunum frá eitt nú eykagjøldum á fiskivinnuna til tey á niðastu rók.

Tímalønin hjá fiskimonnum er enn sera lítil í mun til nógvar aðrar lønarbólkar her á landi, og eiga vit at skapa javnsettar treytir fyri fiskimenn. Men tær sera misvísandi søgunar um gullár hjá fiskimonnum hava á ein hátt gjørt, at tað er torført at grundgeva fyri, at fiskimenn eiga at hava somu rættindi sum øll onnur og eisini vera vardir av lógini. Hetta við at fiskimenn eru gyltir við pengum og sersømdum er vorðið til tað, sum tey rópa hatecrime á enskum málið. Men uppáhaldið er jú so dyggiliga skeivt. Jú, tíbetur eru tað fiskimenn í onkrum parti av flotanum, sum tjena væl, men tíverri umboða teir langtífrá generellu myndina. Hon vísir nevniliga, at alt ov nógvir fiskimenn enn hava eitt tógvið stríð við at fáa endarnar at røkka saman og á fleiri økjum eru fyri vanbýti, tá tað snýr seg um samfelagságóðar sum falla øðrum í lut. Her hugsi eg eitt nú um støðuna, sum fiskimenn koma í, tá teir gerast sjúkir ella fáa skaða. Um hetta úttalaði eg meg í grein í seinasta blaðnum, sum Samtak gav

út saman við Sosialinum – tað var mikudagin, og hava tit øll fingið eitt eintak av tí blaðnum.
Men tá tað við hesi áhaldandi haturskampanjuni hevur eydnast at skapa eina mynd av fiskimonnum sum ein forkelað stætt, er tað sera torført at venda myndini aftur og varpa ljós á trupulleikarnar og tey stóru tøkini, ið mugu takast fyri at betra korini hjá fiskimonnum og lyfta teir upp á eitt støði ájavnt aðrar samfelagsbólkar her á landi. Hetta eru stór tøk, sum skulu takast, bæði tá snýr seg um at ávirka og kunna okkara politikarar, so teir síggja tørvin á av álvara at betra karmarnar, sum teir og almennu myndugleikarnir undir teimum seta fyri okkara fiskimenn, og ikki minni í sáttmálasamráðingunum. Fiskimenn eru ikki vardir av fyrisitingarlógini, lógini um starvsmenn ella tænastumannalógini. Men vit skulu krevja, at vit fáa somu rættindi, sum teir samfelagsbólkar, ið eru vardir av og fáa sømdir eftir hesum lógum.

## Er okkara Løgting fyri okkum øll?

Eg haldi, tað er sera ivasamt, um Løgtingið eigur at hava rætt til at áleggja øllum føroyingum at gjalda tað sama til almennu kassarnar, tá øll ikki eru líka fyri lógini. Tá vit fiskimenn til dømis ikki fáa somu sjúkraviðbøtur sum onnur, so kennist tað órættvíst, at vit skulu gjalda tað sama sum øll onnur; og nú eisini eitt tilfeingisgjald omaná. Eg kundi hildið áfram, men tænastur landsins eru ikki líka fyri øll. Tað er ein sannroynd, hóast tað í einum framkomnum fólkaræði sjálvsagt ikki átti at borið til at gera mun á fólki.
Løgtingið hevur eisini tikið frá okkum vunnin rættindi. Eitt dømi er frítíðartryggingin, sum bleiv rykt undan fiskimonnum og arbeiðarum, meðan sama Løgting letur partar av fjøldini vera undir hesi skipan uppá landsins besta.

Men ongin fer væl av, at annar fer illa, og nú eru tekin um, at aðrir bólkar í samfelagnum eisini standa fyri skotum. Tí er umráðandi, at vit øll, fiskimenn, sjómenn og vanligir løntakarar, standa saman ímóti hesi gongd.

# Fiskimálaráðið og Vørn

Tað hevur undrað nógv, at tá illgrunið er um óreglusemi av onkrum slagi, tykjast Fiskimálaráðið og Vørn at royna at leggja lok á og lata hurðarnar væl aftur. Hetta merkja vit eisini javnan í Fiskimannafelagnum, tá vit royna at fáa greiðu á ymsum málum. Ofta er sera torført at fáa neyðugu upplýsingarnar, og Vørn og Sjóvinnustýrið duga sera væl at blaka alla ábyrgdina hvørt á annað. Tað løgna er, at í vanligum málum, har onki illgrunasamt er, vísir tað seg at vera lagamanni at lata okkum umbiðið tilfar beinanvegin. Í dagligu umsitingini í Fiskimannafelagnum er tað eitt ynski, at Vørn tekur ta ábyrgd, stovnurin eigur, og meldar seg inn í samfelagið.
Tá myndugleikin ikki kennir ábyrgd yvir fyri fólkinum og teimum aktørum og samfelagsbólkum, ið hesin sami myndugleiki er settur at tæna, so endar alt í einum ruðuleika, anarkii, fyrr ella seinni. Tað er í sera nógvum førum staðfest, at myndugleikarnir í fleiri førum ikki eru til gagns fyri borgaran, men heldur seta forðingar í vegin.
Fyri okkara viðkomandi hevur tað í summum málum av heilum huga verið arbeitt ímóti, at Fiskimannafelagið fekk nakað sum helst at vita. Til dømis tá vit vegna okkara limir og alt Føroya Fólk hava viljað havt yvirlit yvir landingar og prísir. Vit fáa ikki prísirnar. Grundgevingin er, at talan er um vinnuviðkvæmar upplýsingar, men tað merkir, at ongin sleppur at eftirkanna, hvat virði tað einstaka skipið ella reiðaríið veruliga fær burtur úr tí tilfeinginum, sum vit øll sambært lógini eiga. Reint praktiskt merkir tað fyri

okkum, at tað er sera ringt at halda eyga við og eftirkanna, um uppgerðirnar eru rættar, tá ivaspurningar um hetta stinga seg upp. Hinvegin hevur Fiskimannafelagið gjørt Vørn varugt við falskar uppgerðir – eisini falskar upplýsingar til Vørn – hjá skipi, sum hevur landað í Danmark, men okkum vitandi hevur Vørn onki gjørt við tað. Her er kanska eisini vert at nevna, at tað ongantíð er nakar trupulleiki at fáa tær upplýsingarnar frá donskum myndugleikunum, sum vit ikki kunnu fáa her heima. Skipini skulu jú rapportera landingarnar til føroysku myndugleikarnar, til Vørn, eisini tá tey landa uttanlands.

Eg dugi ikki at siga, hví Vørn tykist vera so tungt at dansa við – um tað er illvilji ella bara tí, tey eru bangin fyri at gera nakað skeivt og tí bara siga nei fyri at vera á tí tryggu síðuni. Kanska er tað sjálvt lógarverkið, tað er galið við, og umsitingarmannagongdirnar. Men í mínum sinni er ongin ivi: Alt sum hevur við okkara høvuðsvinnu at gera eigur at vera fullkomuliga opið fyri almenninginum. Tað átti ikki eingongd at verið neyðugt at biði um alment innlit í upplýsingarnar um skip, fiskirættindi, landingar, prísir o.s.fr. Alt átti at ligið alment atkomuligt á netinum. Gamaní kann ein fáa nógv at vita á heimasíðuni Teyggjuni hjá Fiskivinnustovuni, men tú fært ikki leita aftureftir har. Og heimasíðan hjá Vørn hevur eisini ávísar upplýsingar, men er sera torfør at finna runt í. Og sum nevnt eru tað nógvar upplýsingar, tey ikki vilja lata frá sær.

Tað er prógvað ferð eftir ferð, at Fiskimannafelagið hevur havt grein í sínum málið, tá tað hevur stevnt fyri óreglusemi. Men ofta hevði tað helst ikki verið neyðugt við drúgvum rættarmálum, um vit beinanvegin fingu atgongd til tær upplýsingar, sum annaðhvørt kundu vátta ella avsanna illgrunan.

# Tvørlig rættarskipan

Tað eru fleiri, ið halda, at okkara rættarskipan er ikki fyri tey veiku í samfelagnum. Hetta sæst aftur í, at tað ofta skulu leggjast nógvir pengar til síðis, áðrenn eitt mál yvirhøvur verður reist. Tað hevur sjálvandi sína ávirkan á, hvør sleppur at royna seg í okkara rættarskipan. Tó skal sigast, at øll kunnu royna at søkja um rættarhjálp og fríða rættargongd.

Eisini fyri fiskimannafelagið eru upphæddirnar í summum førum so stórar, sum skulu leggjast sum trygd fyri at fremja arrest í einum skipi, at vit mugu halda okkum aftur at gera tað, tí tað hevði tømt felagið fyri likviditet.

Ein annar trupulleiki hjá okkum, og hann er stórur, er langa tíðin, tað tekur at fáa mál avgjørd og avgreidd í rættarskipanini. Mál, sum at síggja til eru púra opinlýs, kunnu liggja ár í rættarskipanini, tí advokatar hjá reiðarum við ymiskum snildum sleppa at fáa tey í drag. Hetta kann vera sera hart fyri tey, sum eru partur av einum slíkum rættarmáli, tí tey í langa tíð ikki ána, um tey eru keypt ella seld. Eisini krevja hesi málini nógva arbeiðsorku í okkara umsiting, meðan tey liggja í rættarskipani, tí tey raktu hava sjálvsagt tørv á at tosa við felagið um málið, og ringja tíðum ella støkka inn á gólvið fyri at frætta nýtt.

Hetta mugu tit endiliga ikki misskilja, tí sjálvandi eru allir limir altíð vælkomnir at venda sær til skrivstovuna at tosa um síni mál og viðurskifti annars. Tað er tað, vit eru til.

Men eg staðfesti bara, at um rættarskipanin arbeiddi skjótari, so hevði tað eisini frígivið arbeiðsorku í felagnum til skjótari at taka sær av øðrum málum.

Føroya Fiskimannafelag hevur enn nógv mál í rættarskipanini. Eg nevndi í áðni, at rættarmálini ganga sera seint og taka sera nógva tíð.

Tað er sagt fyrr, og tað kann ikki sigast ov ofta, at menn, ið eru partar av einum rættarmálið, verða stressaðir av tí longu tíðini, sum tað tekur at fáa mál avgreidd. Tað hevði verið ynskiligt, at málini gingu skjótari.
Vit hava nógv mál í rættarskipanini, og tað sær út til, at tað koma vit at hava nøkur ár fram. Tað sær út til, at við nýggjum aktørum í vinnuni, so koma eisini fleiri nýggj mál. Her verður hugsað um útlendskan kapital, sum hevur funnið sær nógvar vinir í føroyskari fiskivinnu og umsiting. Tað hevði verið ynskiligt fyri okkum, at fiskiloyvi vórðu tikin frá reiðaríum, sum ikki halda sáttmálan og landsins lógir. Tað eigur hóast alt hava almennan áhuga, at vit hava reiðaríir, ið eru við til at stimbra undir samfelagið og tey arbeiðspláss, ið her eru. Tað gera vit best við at lata teir, ið hava skipað viðurskifti og halda lógir og reglur, fáa góðar karmar, meðan vargarnir vera steðgaðir við lóg.

# Anita

Føroya Fiskimannafelag hevur leingi hildið eyga við garnaskipinum Anitu. Tað gjørdu vit eisini áðrenn syndarligu vanlukkuna í februar, tá 34 ára gamli Saefundin úr Indonesia sjólætst.
Tað kravdi nógv at fáa okkara myndugleikar inn í málið. Skipið slapp at vera verðandi til fiskiskap eftir syndarligu vanlukkuna, sum um onki var hent. Tá skipið endiliga kom inn, meldaði Fiskimannafelagið reiðaríið fyri at brúka ólógliga arbeiðsmegi til at leggja veiðuna upp. Teir lótu nevniliga indonesisku manningina, sum ikki hevði føroyskt arbeiðs- og uppihaldslovyi, landa fiskin. Tað eru ongar sum helst ábendingar um, at nakar myndugleiki sjálvur hevði havt tikið stig til at kanna skipið nærri og enn minni steðga tí, um Fiskimannafelagið ikki hevði havt meldað tað til løgregluna.

Fiskimannafelagið boðaði eisini skrivliga okkara fiskivinnumyndugleikum frá, at skipið var meldað, og at vit høvdu illgruna um víttfevnt óreglusemi umborð.
Vørn tóktist ikki ætla at gera nakað við málið. Kanska tí Fiskiveiðieftirlitið hjá stovninum stutt fyri vanlukkuna hevði framt eftirlit umborð á skipinum, meðan tað lá á Miðvági, og tá lítið og onki hevði funnið at rapportera annað enn, at nakrar boyur vóru ov illa merktar.
Vit hava ta áskoðan, at øll tey brot, sum blivu staðfest umborð á Anitu, og sum reiðaríið framdi, kundu verið avdúkað og steðga við vanligum eftirliti. Og um lurtað var eftir okkum beinanvegin, hevði ikki verið neyðugt, at vit skuldu heilt út í apríl mánaða, áðrenn Vørn gjørdi nakað ítøkiligt við skipið og reiðaríið.
Tað er neyvan nakrar ivi um, at nógv halda, at sjálvt grundarlagið undir rakstrinum av Anitu, brýtur við ætlanirnar við okkara fiskivinnu og fiskivinnulóggávu. Allur kapitalurin er útlendskur, og tað er ógreitt, hvønn leiklut reiðarin yvirhøvur hevur. Hann stendur til at fáa null krónur í løn, og tað í sær sjálvum tykist bæði løgið og illgrunasamt.

# Fyrrverandi formaður móti FF

Tað keðiligasta málið yvirhøvur fyri mítt viðkomandi í Fiskimannafelagnum, er tað við fyrrverandi formanni okkara.
Tað sum eigur at vera fortíð sleppur tíverri ikki at vera tað, men nú er tað komið har til, at tað verður rætturin, ið setir – vónandi – seinasta punktumið í klandrinum, sum hevur verið millum felagið og Óla Jacobsen, síðani hann fór frá 1. februar í 2007.
Onkur heldur kanska, at vit bara áttu at latið sum onki, latið hann bera seg at, sum hann vil, og latið hann fingið ta lívsløn, hann sjálvur var við til at tillutað sær í 2004. Tað hevði eg eisini sjálvur havt bestan

hug til, tí gamalt agg og beiskleiki hava sjáldan nakað gott við sær, um hesar kenslur sleppa at vera drívmegin. Tvørturímóit eru tað sera oyðileggjandi kenslur.
Men vit vóru einfalt komin har til, at vit máttu gera okkurt, tí virksemið hjá fyrrverandi formanninum var farið langt út um øll góðtakilig mørk og var beinleiðis farið at kosta felagnum og tykkum limum pengar, samstundis sum tað máaði virðið undan sáttmálaásetingum – ásetingum sum hann annars sjálvur í fleiri førum hevði verið við til at sett í sáttmálan.
Nevndin kendi seg noydda at gera okkurt, tá fyrrverandi formaðurin sum vitni í einum gerðarrættarmáli um, hvørt fiskimenn skuldu vera við til at gjalda fyri kvotur, sum vóru keyptar á uppboðssølu, fór langt út um tað, sum væntast og krevst av einum vitni.
Hann hjálpti reiðarunum at fyrireika málið – tað hevur hann sjálvur viðgingið – og í rættinum kom hann óbiðin og uttan nakra sakliga grund við egnum útrokningum, sum styrktu støðuna hjá reiðarunum munandi. Fiskimannafelagið tapti málið, og tað bleiv einaferð med alla sligið fast, at fiskimenn skulu vera við til at gjalda fyri uppboðssølukvotur. Lesa tit úrskurðin hjá Gerðarrættinum, síggja tit, at ídna vitnisframløgan hjá fyrrverandi formanninum var avgerandi fyri, at vit taptu málið.
Eisini er tað skjalfast, at hann í fleiri øðrum málum, millum annað í sínari almennu skriving og í sínum samskifti við skrivstovuna hjá Fiskimannafelagnum eftir sína formanstíð, hevur verið illoyalur út um øll góðtakilig mørk.
Eg skal ikki fara í smálutir við hesum. Nevndin hevur lagt eina frágreiðing um málið millum felagið og fyrrverandi formannin á heimasíðuna, og har kunnu tit kunna tykkum nærri.
Sjálvt rættarmálið snýr seg um, at Fiskimannafelagið í fjør vár steðgaði lønarútgjøldunum til fyrrverandi formannin vegna grovan illoyalitet, og at hann hinvegin krevur, at útgjaldingin verður

uppafturtikin.
Útgjøldini, ein hálv mánaðarlig arbeiðsmannaløn, samtykti fyrrverandi formaðurin saman við táverandi nevndini í 2004, at hann skuldi hava, tá hann fylti 67 og restina av lívinum. Hóast samsýningin varð kallað eftirløn, so hevur fyrrverandi formaðurin ikki sjálvur spart upp til hana, men verður hon goldin út sum ein púra vanlig A-skattað løn.

# Kartellið DPPO

Vit hava fingi óbodnar gestir úr Danmark inn í okkara flota. Tað eru teir sokallaðu kvotabarónarnir úr Hirtsals sum í tøttum samstarvi við reiðaríið Thor og nøkrum hentum strámonnum hava bjóðað føroyska samfelagnum av. Her má danska orðatakið "lige børn leger bedst" av sonnum sannast. Danska uppsjóvarvinnan er tiltikin í Danmark, tí tað har fyri einum 15 árum síðani eydnaðist henni at fáa stjórnina at lata sær alt tað pelagiska tilfeingið hjá donsku tjóðini. Alt virksemið verður samskipað í DPPO (Dansk Pelagisk Producentorganisation), sum er eitt kartell mannað við millum annað fleiri føroyingum, búsitandi í Danmark. DPPO gekk á odda at fáa EU at lýsa boykott móti føroyingum. Tá skuldsettu teir føroyingar fyri ikki at fiska burðardygt og gera tað enn, meðan teir sjálvir væl hjálptir av okkara egna fiskimálaráðharra lirka seg inn gjøgnum bakdyrnar at fiska føroyskan makrel.
Eg haldi avgjørt, at slíkt virksemi er undirgravandi fyri alla okkara fiskivinnu og ikki minni fyri tykkum, limirnar í Fiskimannafelagnum. Tí eigur slíkt virksemi eisini at fáa durafjórðingin í stundini.
Tíverri hava eisini nakrir heilt fáir av okkara egnu limum í reinari fávitsku gjørt seg til finnur í hesum skitna talvi, men teir hava síðani

tikið betri partar fyri. Tíbetur, tí vit mugu standa sum ein maður at verja okkara arbeiðspláss og tað tilfeingi, sum er alt grundarlagið undir teimum.
Samstundis sum hesi umboðini fyri danska uppsjóvarkartellið ótarnaði sleppa at hóreiggja sær, sum tey vilja her heima, so hava føroyskir fiskimenn og reiðarar, sum hava stríðst og strevast fyri at fáa fiskiskap at bera til á føroyska landgrunninum, fingið bums nei til at fáa eit lítið sindur burtur av pelagiska yvirflotinum, ið hevur verið hesi seinastu árini. Okkara hart kroystu útróðrarbátar og línubátar eru millum annað við sviðusoð.

# Samráðingar

Samráðingar byrja í januar millum Føroya Reiðarafelag og manningarfeløgini. Føroya Reiðarafelag hevur nógv at gera í sambandi við millumlandasamráðingar. Vit høvdu vónað, at samráðingar vóru byrjaðar í seinasta lagi seinast í november, men gingu við til at útseta samráðingarnar til nakað inn í januar mánaða. Vit hava tó ikki longt sáttmálarnar, sum ganga út á nýggjárinum, og tí fáa allar broytingar eisini virknað aftureftir frá 1. januar. Vit høvdu sjálvandi bara kunnað sagt nei til at útseta samráðingarnar, men úrslitið hevði bara verið, at reiðararnir ikki møttu til fundar kortini, og eitt slíkt mál hevði altso verið ov lítið til at lagt flotan uppá. Men vit vóna, at okkara góðvilji fer at verða afturløntur av mótpartinum undir samráðingunum.
Manningarfeløgini hava ikki enn gjørt av, um tey fara at samráðast saman ella hvørt sær. Vit hava heilt víst nøkur felags áhugamál, men eisini ymisk seráhugamál. Eitt nú eru áhugamál og tørvir rættiliga ymisk, tá tað snýr seg um uppsjóvarflotan og býtisprosentini hjá ávikavist ídnaðarskipum og nótaskipum. Fyri feløgini hjá yvirmonnunum er tað nærum líkamikið, hvørjum av hesum

sáttmálum, teirra limir arbeiða undir, tí eykapartarnir vaksa bara tilsvarandi, tá flutt verður frá sáttmálanum við hægra býtisprosentinum til tann við tí lægra býtinum. Okkara limir missa hinvegin útvið 10 býtisprosent, um teir skulu fara frá ídnaðarsáttmálan til nótasáttmálan.

Í ár gjørdu hini bæði manningarfeløgini frávik í sáttmálanum at galda fyri Grunnabarð og Asbjørn Senior, ið bæði eftir røttum hoyra undir ídnaðarsáttmálan. Tey bæði feløgini góðtóku, at býtisprosentið fór niður á 17,5 prosent, men við tí treyt, at yvirmannapartanir blivu sum hjá nótaskipunum og fóru upp, soleiðis, at tað ikki kostaði yvirmonnunum nakað.

Hetta hevði við sær eitt øðiligt trýst á Fiskimannafelagið, har reiðaríið hjá hesum báðum skipunum beinleiðis hótti nevndina í Fiskimannafelagnum. Tað bleiv kravt, at vit bara uttan nakað lótu 10 býtisprosent frá okkum, tí tað høvdu hini bæði feløgini gjørt. Vit svaraðu aftur, at vit ikki vildu ganga við til, at tann lægst lønti parturin lat av sínari hýru til teir, ið longu høvdu ovurstóra hýru. Her hevði eg væntað, at hini bæði manningafeløgini stóðu saman við okkum, tí so nógv vinna teir samanumtikið heldur ikki við at gera ein nótasáttmála fyri ídnaðarskip.

Men teir gjørdu einsæris hesa avtalu, sjálvt um vit sjálvsagt ikki vildu ganga við til at minka hýruna hjá okkara monnum við einum góðum triðingi – frá 27 prosentum niður á 17,5 proent – at lata til hini bæði feløgini at býta.

Vit hava annars ein langan lista við krøvum til sáttmálasamráðingarnar, men tað er góð siðvenja, at partarnir virða hvønn annan so mikið, at tað ikki verður farið alment út við krøvunum og smálutum í tí sambandi, fyrr enn samráðingarnar annaðhvørt eru komnar undir land ella slitna.

Men vit kunnu tó siga so mikið, at tryggingar og starvssømdir hjá fiskimonnunum verða partur av samráðingunum. Tí sum nevnt í

innganginum, so eru vit av álvara eftirbátur, tá tað snýr seg um tryggingar og millum annað sjúkraviðbøtur.
Vit mugu eisini fylgja væl við, hvussu høvuðssáttmálin verður handfarin, og hvørjar avtalur verða gjørdar við støði í honum. Fleiri skip í uppsjóvarflotanum hava eina skipan, har teir fáa eitt fast útgjald um mánaðin, og síðani verður alt gjørt upp, tá árið er liðið. Hetta er ein samhaldsføst skipan, tí samlaða árshýran verður roknað út í dagsvirðir, sum menninir so verða løntir eftir, alt eftir hvussu nógvar dagar, teir hava verið umborð. Tá er tað líka mikið, nær á árinum ein hevur verið við, dagshýran er hin sama hjá øllum. Hetta hevur virkað væl, og menn hava verið nøgdir við tað.
Men nú hava menn á onkrum skipum kent á sær, at teir ikki verða nóg væl kunnaðir og eru farnir at ivast í, um teir nú verða avroknaðir í samsvar við sáttmálan, tá avtornar.
Slíkar skipanir eiga vit at presisera betri, men eg veit ikki, um tað skal gerast í sjálvum sáttmálanum ella møguliga við, at vit gera formligar avtalur við reiðaríini um slíkar avrokningarskipanir og nágreining av teimum.

# Trygd á sjónum

Trygdin á sjónum hevur leingi verið ivasom og er ikki batnað yvirhøvur. Ein stór orsøk til hetta er, at okkara vaktar- og bjargingartænasta liggur ein stóran part av árinum vegna sparingar. Tað verður sagt, at har eru ikki ráð at keypa olju.
Tað eigur ikki at vera so, at fiskimenn skulu ivast í trygdini á sjónum, og um teir fáa neyðugu hjálpina, tá á stendur. Nú tað tykist, at allir politiskir flokkar kappast um at leggja tilfeingisgjald á vinnuna, átti tað at verið eitt krav, at ein ríkiligur partur av hesum gjaldi, sum eisini er ein eykaskattur á fiskimenn, verður nýttur til at bøta um trygdina hjá teimum.

# Tilfeingisgjaldið

Tað mundi koma óvart á, at samgongan setti tilfeingisgjald á makrel og sild. Fiskimannafelagið hevur gingið á odda ímóti tilfeingisgjaldi. Hetta er fyri okkara part ein eykaskattur, ið av órøttum verður lagdur á fiskimenn. Vit fara ongantíð at góðtaka tilfeingisgjald í tí búna, sum tað nú er latið í. Hetta hóast fleiri reiðarar siga seg onki hava ímóti einum ávísum gjaldi. Hinvegin, so eru vit til reiðar at hyggja at einum tilfeingiskatti á reiðaríini. Ein tilfeingisskattur á eitt reiðarí kann ikki flytast yvir á manningarnar. Men tað má ongantíð vera so, at ein slíkur skattur bara fer í stóra pott á fíggjarlógini. Fiskimenn gjalda frammanundan í almennar kassar, til dømis ALS, sum teir onki fáa úr aftur. Ein tilfeingisskattur kundi, um hann nú er so umráðandi at fáa, verið umsitin soleiðis, at hann kemur fiskimonnunum til góðar, so fiskimenn á øllum økjum verða javnsettir við aðrar borgarar her á landi, og so kundi hann annars verið brúktur til neyðugar ábøtur innan okkara fiskivininnuumsiting – pengar at hava vaktarskipini siglandi alt árið og eitt nýtt havrannsóknarskip, bara fyri at nevna tvey øki, har ábøtur eru átrokandi.

# Eftirløn

Tað hevur kostað føroyingum nógv, at vit – fakfeløgini – hvør í sínum lagið eru farin í holt við at gera eftirlønarskipanir hjá ymiskum pensjónsveitarum. Nógv verður skarvað burtur av til umsiting av uppspardu pengunum, og fyri at fjala út yvir hetta verða tryggingar og lán samantvinnaði í hesum skipanum, so at onki gjøgnumskygni er, og tann sakleysi eftirlønaruppspararin ikki veit, hvat vendir upp,

og hvat vendir niður. Vit kunna bara staðfesta, at tað í alt ov stóran mun eydnast pensjónsfeløgum at hála pening frá fólki.
Tann besta eftirlønarskipanin, vit eiga, og sum kundi verið útbygd til at verða fult nøktandi fyri øll, er Samhaldsfasti Eftirlønargrunnurin. Nógv fólk hava lítla og onga eftirlønaruppsparing, og tað er nógv fyri, at flestu politikarar bara sita og hyggja at hesum, meðan teir niðurlaga fólkapensjónina, men ikki fáa Samhaldsfasta at virka soleiðis, sum hann upprunaliga var ætlaður at virka – nevniliga sum ein samhaldsføst eftirlønarskipan fyri allar føroyingar.

# Samanhaldið er okkara styrki

Tað er avgerðandi, at fiskimenn standa saman. Søgan hevur víst okkum, at tað als ikki gagnar nøkrum fiskimanni, tá reiðarar ganga á útvaldar fiskimenn og fáa teir at seta seg upp í móti Fiskimannafelagnum. Sum nevnt fyrr, so eydnaðist tað so seint sum í summar reiðaranum á Asbjørn Senior at fáa manningina at mynstra, hóast manmningarfeløgini høvdu lýst mynstringarbann, tí reiðaríið ikki hevði gjørt sáttmála. Men tann manningin hevur nú ásannað, at hon ikki fekk nakað burtur úr hesum. Tá ein reiðari roynir at skilja fiskimenn frá samanhaldinum og ganga ímóti Fiskimannafelagnum, so skulu tit vita, at endamálið tá uttan undantak er, at teir skulu fáa minni í løn og generelt verri sømdir. Fyri fiskimenninar kann tað ongantíð verða annað enn ein sera dýrt keyptur løtuvinningur.

# Trygdargrunnur Fiskivinnurnar

Umboðið hjá Føroya Fiskimannafelag í Trygdargrunni Fiskivinnurnar hevur, líka síðan grunnurin var settur á stovn, roynt

at hækka minstulønina. Tað hevur gingið sera seint at fáa hana upp, tí óttast hevur verið fyri, at grunnurin skuldi koma í fíggjaligt óføri.
Tað kom tí ógvuliga dátt við, at tann limurin í Trygdargrunninum, sum hevur verið harðast í móti at hækka minstulønina, tók orðið á seinasta fundinum í grunninum, og segði, at nú var ognin so mikið stór, at grunnurin nú kundi fara undir at stuðla ymiskum privatum verkætlanum. Umboðið hjá Føroya Fiskimannafelag svaraði aftur, at grunnurin var settur á stovn fyri at bøta um vánaligu korini hjá fiskimonnum, og at tað kom ikki uppá tal at taka peningin frá teimum illa løntu fiskimonnunum at lata til óviðkomandi endamál.
Til ber at seta spurningin, um fiskimenn kunnu vænta at fáa nakað sum helst burtur úr at taka av fænum, sum teir eiga í grunninum, fyri at lata tað til eina privata fyritøku.
Føroya Fiskimannafelag hevur hinvegin sent fleiri skrivlig uppskot til grunnin, um at hækka útgjaldið til okkara limir. Vit hava biðið umsitingina rokna út, hvat tað kostar at hækka útgjaldið til minstuløn úr 925 krónum og upp í ymiskar satsir í økinum 1000 til 2000 krónur.
Tað kann tó vera vandamikið hjá umboðnum hjá Føroya Fiskimannafelag at fara at spæla ov ógvusliga við musklunum, tí í viðtøkunum fyri grunnin er tað so, at hvør limur hevur sýtingarrætt.
Og viðtøkurnar eru soleiðis orðaðar, at nýtir ein limur sýtingarrættin, so kann gjaldið væl end heilt niðri á 700 krónum um dagin.
Hetta eru sera óhepnar viðtøkur, sum vit mugu trýsta á at fáa broyttar. Tað kann ikki vera rætt, at fiskimenn skulu takast sum gíslar, tí at onkur stýrislimur heldur, at onnur enn júst fiskmenn hava betri uppiborið at fáa stuðul úr grunninum.
Tað er eisini sera óheppið, tá stýrislimir ikki vilja gera tað, sum teir skulu. Uppgávan hjá okkum í stýrinum fyri grunnin er, at fáa so høga minstuløn, sum til ber. Tí er tað eisini sera óheppið, at tveir av

stýrislimunum eru teir somu, sum um árskiftið 2010-2011 gjørdu alt tað, teir vóru mentir, at gera enda á Fiskimannafelagnum. Vónandi eru teir tó komnir so frætt víðari, at teir kunnu seta annað á dagsskrá nú, enn at royna at vinna fiskimonnum neisir.

Við hesum vóni eg, at tit hava fingið eina hylling á virksemið hjá felagnum, og hvat vit hetta seinasta árið hava brúkt orkuna uppá og fari at ynskja okkum øllum ein góðan Landsfund.

Takk fyri.

## Inntøkur fiskimanna

| Ár | Dg | Fiski part | Frt l | Dagst. | Min. l | Tils | Pr.dag kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Stórir ísfiskatrolarar** | | | | | | | |
| 2014 | 165 | 311 | 38 | 0 | 2 | 351 | 2124 |
| 2013 | 205 | 290 | 36 | 0 | 11 | 337 | 1648 |
| 2012 | 225 | 362 | 44 | 0 | 5 | 411 | 1824 |
| 2011 | 241 | 464 | 56 | 0 | 0 | 520 | 2157 |
| 2010 | 287 | 447 | 55 | 8 | 1 | 511 | 1800 |
| 2009 | 284 | 417 | 52 | 13 | 4 | 482 | 1696 |
| 2008 | 188 | 304 | 37 | 4 | 3 | 345 | 1834 |
| 2007 | 243 | 390 | 47 | 4 | 1 | 442 | 1816 |
| 2006 | 251 | 395 | 48 | 4 | 0 | 447 | 1779 |
| 2005 | 251 | 397 | 49 | 11 | 2 | 459 | 1824 |
| **Smáir ísfiskatrolarar** | | | | | | | |
| 2014 | 203 | 303 | 37 | 0 | 11 | 351 | 1654 |
| 2013 | 229 | 325 | 41 | 0 | 14 | 380 | 1663 |
| 2012 | 234 | 362 | 45 | 0 | 11 | 418 | 1783 |
| 2011 | 221 | 378 | 46 | 1 | 3 | 428 | 1938 |
| 2010 | 249 | 401 | 49 | 8 | 1 | 460 | 1850 |
| 2009 | 231 | 351 | 43 | 10 | 1 | 405 | 1751 |
| 2008 | 219 | 317 | 39 | 8 | 1 | 365 | 1664 |
| 2007 | 258 | 374 | 46 | 6 | 0 | 426 | 1655 |
| 2006 | 269 | 454 | 55 | 6 | 1 | 516 | 1948 |
| 2005 | 271 | 380 | 47 | 11 | 1 | 439 | 1619 |
| **Ísfiskalínuskip** | | | | | | | |
| 2014 | 211 | 227 | 30 | 0 | 20 | 277 | 1308 |
| 2013 | 215 | 194 | 27 | 0 | 32 | 253 | 1176 |
| 2012 | 228 | 216 | 29 | 0 | 22 | 267 | 1170 |
| 2011 | 232 | 218 | 29 | 8 | 19 | 273 | 1178 |
| 2010 | 249 | 220 | 31 | 31 | 8 | 290 | 1164 |
| 2009 | 212 | 117 | 23 | 49 | 23 | 212 | 997 |
| 2008 | 218 | 198 | 28 | 30 | 10 | 266 | 1220 |
| 2007 | 230 | 305 | 38 | 10 | 1 | 354 | 1803 |
| 2006 | 229 | 287 | 36 | 11 | 1 | 335 | 1464 |
| 2005 | 233 | 249 | 32 | 16 | 3 | 300 | 1290 |

| | Dg | Fiski part | Frt l | Dagst. | Min. l | Tils | Pr.dag kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Hekkutrolarar á flakaveiðu** | | | | | | | |
| 2014 | 190 | 642 | 78 | 0 | 6 | 726 | 3827 |
| 2013 | 243 | 687 | 82 | 0 | 2 | 771 | 3848 |
| 2012 | 294 | 836 | 101 | 0 | 4 | 941 | 3203 |
| 2011 | 263 | 829 | 99 | 0 | 0 | 928 | 3525 |
| 2010 | 298 | 917 | 110 | 0 | 0 | 1027 | 3450 |
| 2009 | 231 | 438 | 53 | 1 | 0 | 491 | 2129 |
| 2008 | 246 | 563 | 68 | 1 | 0 | 632 | 2574 |
| 2007 | 310 | 764 | 92 | 3 | 0 | 859 | 2773 |
| 2006 | 337 | 790 | 95 | 5 | 0 | 890 | 2641 |
| 2005 | 253 | 454 | 55 | 1 | 0 | 510 | 2015 |
| **Garnaskip á svartkalva- og havtaskuveiðu** | | | | | | | |
| 2014 | 230 | 344 | 43 | 0 | 16 | 403 | 1754 |
| 2013 | 258 | 355 | 46 | 0 | 23 | 424 | 1646 |
| 2012 | 108 | 169 | 20 | 0 | 7 | 196 | 1664 |
| 2011 | 189 | 251 | 31 | 2 | 9 | 294 | 1557 |
| 2010 | 160 | 173 | 28 | 12 | 5 | 258 | 1611 |
| 2009 | 230 | 215 | 32 | 38 | 11 | 295 | 1284 |
| 2008 | 212 | 230 | 30 | 17 | 4 | 281 | 1323 |
| 2007 | 265 | 421 | 51 | 9 | 2 | 483 | 1812 |
| 2006 | 272 | 345 | 44 | 14 | 3 | 406 | 1742 |
| 2005 | 309 | 398 | 51 | 24 | 8 | 481 | 1554 |

| Àr | Dg | Fiski part | Frt l | Dagst. | Min. l | Tils | Pr.dag kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Ìdnaðartrolarar** | | | | | | | |
| 2014 | 125 | 513 | 63 | 0 | 10 | 586 | 4688 |
| 2013 | 193 | 737 | 90 | 0 | 12 | 839 | 4349 |
| 2012 | 167 | 713 | 86 | 0 | 7 | 806 | 4827 |
| 2011 | 91 | 493 | 60 | 0 | 4 | 557 | 6104 |
| 2010 | 203 | 693 | 84 | 9 | 2 | 788 | 3873 |
| 2009 | 105 | 269 | 33 | 6 | 2 | 310 | 2952 |
| 2008 | 152 | 361 | 44 | 4 | 4 | 414 | 2722 |
| 2007 | 135 | 348 | 43 | 7 | 5 | 403 | 2992 |
| 2006 | 135 | 262 | 37 | 25 | 19 | 343 | 2543 |
| 2005 | 192 | 198 | 29 | 28 | 16 | 271 | 1410 |
| **Nótaskip** | | | | | | | |
| 2014 | 203 | 1201 | 145 | 0 | 5 | 1351 | 6667 |
| 2013 | 207 | 1302 | 156 | 0 | 2 | 1460 | 7043 |
| 2012 | 193 | 1291 | 155 | 0 | 2 | 1448 | 7489 |
| 2011 | 181 | 1516 | 183 | 0 | 4 | 1703 | 9435 |
| 2010 | 238 | 1362 | 162 | 6 | 8 | 1541 | 6479 |
| 2009 | 177 | 726 | 89 | 7 | 7 | 828 | 4663 |
| 2008 | 239 | 843 | 103 | 7 | 8 | 961 | 4021 |
| 2007 | 280 | 1036 | 126 | 7 | 8 | 1177 | 4210 |
| 2006 | 240 | 927 | 112 | 5 | 5 | 1049 | 4379 |
| 2005 | 261 | 735 | 90 | 8 | 8 | 841 | 3222 |
| **Rækjutrolarar** | | | | | | | |
| 2014 | 190 | 642 | 78 | 0 | 6 | 726 | 3827 |
| 2013 | 247 | 625 | 75 | 0 | 2 | 702 | 2845 |
| 2012 | 323 | 836 | 100 | 0 | 0 | 936 | 2903 |
| 2011 | 349 | 773 | 93 | 0 | 0 | 865 | 2479 |
| 2010 | 297 | 588 | 71 | 3 | 0 | 662 | 2269 |
| 2009 | 352 | 610 | 74 | 4 | 3 | 691 | 1965 |
| 2008 | 367 | 654 | 79 | 1 | 0 | 733 | 1995 |
| 2007 | 304 | 536 | 65 | 3 | 0 | 604 | 1989 |
| 2006 | 239 | 315 | 38 | 5 | 0 | 358 | 1500 |
| 2005 | 212 | 229 | 29 | 12 | 0 | 270 | 1271 |

## Gongdin í daginntøkuni

| Ár | Tíma løn | Dagløn 8 tímar | Daglønir, alt íroknað og lutfall við daglønir á landi Ìsfiskalínuskip | | Stórir ísfiskatrol | | Smáir ísfiskatrol | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1994 | 83,64 | 669 | 772 | 1,2 | 815 | 1,2 | 867 | 1,3 |
| 1995 | 83,64 | 669 | 756 | 1,1 | 831 | 1,2 | 940 | 1,4 |
| 1996 | 83,64 | 669 | 853 | 1,3 | 905 | 1,4 | 1052 | 1,6 |
| 1997 | 84,96 | 680 | 1085 | 1,6 | 966 | 1,4 | 1109 | 1,6 |
| 1998 | 85,81 | 686 | 1539 | 2,2 | 1239 | 1,8 | 1676 | 2,4 |
| 1999 | 89,79 | 718 | 1417 | 2,0 | 1200 | 1,7 | 1460 | 2,0 |
| 2000 | 93,77 | 750 | 1255 | 1,7 | 1398 | 1,9 | 1694 | 2,3 |
| 2001 | 98,52 | 788 | 1484 | 1,9 | 1584 | 2,0 | 1892 | 2,4 |
| 2002 | 103,26 | 826 | 1732 | 2,1 | 1728 | 2,1 | 1855 | 2,2 |
| 2003 | 108,08 | 865 | 1826 | 2,1 | 1652 | 1,9 | 1473 | 1,7 |
| 2004 | 112,9 | 903 | 1326 | 1,5 | 1577 | 1,7 | 1358 | 1,5 |
| 2005 | 112,9 | 903 | 1290 | 1,4 | 1824 | 2,0 | 1619 | 1,8 |
| 2006 | 112,9 | 903 | 1464 | 1,6 | 1779 | 2,0 | 1948 | 2,2 |
| 2007 | 117,07 | 937 | 1536 | 1,6 | 1815 | 1,9 | 1655 | 1,8 |
| 2008 | 119,67 | 957 | 1234 | 1,3 | 1820 | 1,9 | 1609 | 1,7 |
| 2009 | 122,38 | 979 | 997 | 1 | 1697 | 2 | 1751 | 1,8 |
| 2010 | 123,61 | 989 | 1169 | 1,2 | 1819 | 1,8 | 1878 | 1,9 |
| 2011 | 126,02 | 1008 | 1170 | 1,2 | 1820 | 1,8 | 1879 | 1,9 |
| 2012 | 127,44 | 1020 | 1171 | 1,1 | 1821 | 1,8 | 1880 | 1,8 |
| 2013 | 129,52 | 1036 | 1182 | 1,1 | 1640 | 1,6 | 1686 | 1,6 |
| 2014 | 131,98 | 1056 | 1308 | 1,2 | 2124 | 2,0 | 1654 | 1,6 |

Í tímalønini er roknað frítíðarløn. Í daglønum hjá fiskimonnum eru íroknaðar allar viðbøtur. Fyri 2014 er lutvíst gjørt upp inntøkan higartil í 2014 og lutvíst tann inntøka, sum roknast kann við við verandi veiðu og prísum. Tað, sum fiskimenn fáa útyvir eina dagløn á landi (t.e tað, sum er útyvir 1 í talvuni), er tann viðbót, sum fiskimenn fáa fyri teirra arbeistíð útyvir 8 tímar, fyri at arbeiða allar dagar í vikuni v.m.

## Gongdin í veiðusamanseting

Vit hava síðani 1975 gjørt upp gongdina í veiðu og veiðusamanseting hjá ísfiskaskipum. Gongdin síðani 1996 hevur verið hendan:

**Smáir trolarar**

| (Í %) | | -14 | -13 | -12 | -11 | -10 | -9 | -8 | -7 | -6 | -5 | -4 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tosk | 1 partr | 0 | 0 | 0 | 1 | | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 |
| - | 1 lem.tr. | | | | | | 0 | 0 | 1 | 1 | 25 | 23 |
| Tosk | 2 partr. | 4 | 2 | 3 | 6 | 4 | 1 | 2 | 2 | 2 | 2 | 7 |
| - | 2 lem.tr. | | | | | | 0 | 0 | 17 | 21 | 0 | 0 |
| Hýsa | partr. | 1 | 1 | 0 | 1 | 1 | 2 | 2 | 3 | 2 | 2 | 4 |
| - | lem.tr. | | | | | | 0 | 0 | 43 | 23 | 27 | 25 |
| Upsi | partr. | 84 | 51 | 62 | 67 | 84 | 91 | 91 | 90 | 90 | 76 | 72 |
| - | lem.tr. | | | | | | 0 | 0 | 8 | 15 | 8 | 9 |
| Kongaf. | partr. | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 | 1 |
| - | lem.tr. | | | | | | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 4 |
| Blálon. | partr. | 0 | 0 | 0 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| - | lem.tr. | | | | | | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Annað | partr. | 10 | 45 | 34 | 23 | 10 | 6 | 5 | 5 | 6 | 20 | 15 |
| - | lem.tr. | | | | | | 0 | 0 | 31 | 40 | 40 | 39 |
| Í alt % | partr. | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 |

**Stórir trolarar**

| (Í %) | | -14 | -13 | -12 | -11 | -10 | -9 | -8 | -7 | -6 | -5 | -4 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Toskur 1 | | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 | 0 | 1 | 1 | 1 |
| Toskur 2 | | 14 | 1 | 1 | 2 | 3 | 2 | 10 | 8 | 6 | 21 | 19 |
| Hýsa | | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 | 1 | 1 | 2 | 1 | 1 | 1 |
| Blálonga | | 8 | 1 | 1 | 2 | 8 | 4 | 3 | 4 | 7 | 6 | 6 |
| Upsi | | 17 | 16 | 40 | 26 | 44 | 51 | 54 | 57 | 53 | 44 | 25 |
| Kongafiskur | | 4 | 1 | 1 | 2 | 10 | 8 | 6 | 5 | 13 | 11 | 18 |
| Svartkalvi | | 30 | 5 | 7 | 6 | 7 | 11 | 3 | 2 | 3 | 2 | 3 |
| Stinglaksur | | 11 | 2 | 2 | 3 | 7 | 6 | 6 | 3 | 3 | 2 | 5 |
| Annað | | 15 | 73 | 48 | 59 | 20 | 17 | 16 | 19 | 13 | 12 | 22 |
| Í alt % | partr. | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 |

**Línuskip**

| (Í %) | -14 | -13 | -12 | -11 | -10 | -9 | -8 | -7 | -6 | -5 | -4 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Toskur 1 | 8 | 12 | 7 | 7 | 5 | 5 | 5 | 4 | 4 | 5 | 6 |
| Toskur 2 | 23 | 28 | 17 | 22 | 19 | 19 | 23 | 24 | 20 | 18 | 23 |
| Hýsa | 14 | 11 | 7 | 9 | 13 | 16 | 19 | 33 | 36 | 45 | 39 |
| Blálonga | 1 | 3 | 5 | 8 | 4 | 3 | 2 | 16 | 15 | 10 | 11 |
| Upsi | 2 | 3 | 3 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Kongafiskur | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 13 | 15 | 11 | 11 |
| Svartkalvi | 1 | 1 | 6 | 3 | 1 | 1 | 1 | 2 | 1 | 0 | 0 |
| Stinglaksur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Annað | 41 | 41 | 54 | 50 | 57 | 55 | 49 | 8 | 9 | 11 | 10 |
| Í alt % partr. | 91 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 |

## Gongdin í ísfiskaveiðuni



**Línuskip**

| Ár | Veiða pr. dag | Menn | pr. Mann pr.dag |
|---|---|---|---|
| 1982 | 3800 | 15 | 253 |
| 1983 | 3900 | 15 | 260 |
| 1984 | 3900 | 15 | 260 |
| 1985 | 3800 | 15 | 253 |
| 1986 | 3500 | 14 | 250 |
| 1987 | 3600 | 14 | 257 |
| 1988 | 3400 | 13,3 | 256 |
| 1989 | 3600 | 14 | 257 |
| 1990 | 3100 | 14 | 221 |
| 1991 | 2600 | 14 | 186 |
| 1992 | 2300 | 14 | 164 |
| 1993 | 2250 | 14 | 161 |
| 1994 | 2760 | 14 | 197 |
| 1995 | 2830 | 14 | 202 |
| 1996 | 3720 | 14 | 266 |
| 1997 | 4500 | 14 | 321 |
| 1998 | 4800 | 14 | 343 |
| 1999 | 3750 | 13,8 | 272 |
| 2000 | 3020 | 13,7 | 220 |
| 2001 | 3340 | 13,6 | 246 |
| 2002 | 4519 | 13,6 | 332 |
| 2003 | 5184 | 14,1 | 368 |
| 2004 | 4342 | 13,9 | 312 |
| 2005 | 3722 | 13,8 | 270 |
| 2006 | 3581 | 13,6 | 263 |
| 2007 | 3313 | 13,4 | 247 |
| 2008 | 3069 | 13,4 | 229 |
| 2009 | 3046 | 13,6 | 224 |
| 2010 | 3735 | 13,8 | 271 |
| 2011 | 3709 | 13,8 | 269 |
| 2012 | 3772 | 13,8 | 273 |
| 2013 | 4070 | 13,6 | 299 |
| 2014 | 4005 | 13,4 | 299 |

**Smáir trolarar**

| Ár | Veiða pr. dag | Menn | pr. Mann pr.dag |
|---|---|---|---|
| 1979 | 3100 | 7 | 443 |
| 1980 | 3400 | 6,5 | 523 |
| 1981 | 3500 | 6,5 | 538 |
| 1982 | 3700 | 6,5 | 569 |
| 1983 | 4700 | 7 | 671 |
| 1984 | 4800 | 7,4 | 649 |
| 1985 | 4170 | 7,4 | 564 |
| 1986 | 5500 | 7,6 | 724 |
| 1987 | 4700 | 7,6 | 618 |
| 1988 | 5100 | 7,6 | 671 |
| 1989 | 3800 | 7,4 | 514 |
| 1990 | 4100 | 7,8 | 526 |
| 1991 | 4900 | 8,7 | 563 |
| 1992 | 4000 | 8,7 | 460 |
| 1993 | 3420 | 8,4 | 407 |
| 1994 | 3130 | 8,5 | 368 |
| 1995 | 2765 | 7 | 395 |
| 1996 | 3137 | 6,7 | 468 |
| 1997 | 3950 | 5 | 790 |
| 1998 | 4900 | 5 | 980 |
| 1999 | 3344 | 4,9 | 682 |
| 2000 | 4595 | 5 | 919 |
| 2001 | 4013 | 5 | 803 |
| 2002 | 4588 | 5 | 918 |
| 2003 | 2769 | 5 | 554 |
| 2004 | 2505 | 4 | 626 |
| 2005 | 2867 | 5 | 573 |
| 2006 | 2992 | 5 | 598 |
| 2007 | 2880 | 5 | 576 |
| 2008 | 1851 | 5 | 370 |

**Partrolarar**

| Àr | Veiða pr. dag | Menn | pr. Mann pr.dag |
|---|---|---|---|
| 1989 | 3200 | 5,9 | 542 |
| 1990 | 3300 | 6 | 550 |
| 1991 | 2900 | 5,8 | 500 |
| 1992 | 2900 | 6,2 | 468 |
| 1993 | 3350 | 6,4 | 523 |
| 1994 | 3860 | 6,6 | 585 |
| 1995 | 3846 | 7,3 | 527 |
| 1996 | 4012 | 6,4 | 627 |
| 1997 | 3995 | 6,5 | 615 |
| 1998 | 4900 | 6,5 | 754 |
| 1999 | 4800 | 6,5 | 738 |
| 2000 | 5305 | 6,5 | 816 |
| 2001 | 6587 | 6,5 | 1013 |
| 2002 | 6878 | 6,5 | 1058 |
| 2003 | 6790 | 6,5 | 1045 |
| 2004 | 6234 | 6,5 | 959 |
| 2005 | 8276 | 6,5 | 1273 |
| 2006 | 7637 | 6,4 | 1193 |
| 2007 | 6410 | 6,4 | 1002 |
| 2008 | 6881 | 6,4 | 1075 |
| 2009 | 7206 | 6,5 | 1109 |
| 2010 | 5966 | 6,5 | 918 |
| 2011 | 5821 | 6,4 | 910 |
| 2012 | 6443 | 6,5 | 991 |
| 2013 | 7220 | 6,5 | 1111 |
| *2014 | 4977 | 6,5 | 766 |

Tølini fyri 2014 eru fyribilstøl, gjørd upp eftir avrokningum, sum eru innkomnar pr. 17/12-2014

*Makrelveiðan er ikki við í ár. Tað var hon í yvirlitinum í fjør.

**Stórir trolarar**

| Àr | Veiða pr. dag | Menn | pr. Mann pr.dag |
|---|---|---|---|
| 1983 | 8700 | 12 | 725 |
| 1984 | 8300 | 12 | 692 |
| 1985 | 6670 | 12 | 556 |
| 1986 | 6800 | 12,4 | 548 |
| 1987 | 6800 | 12,4 | 548 |
| 1988 | 6700 | 12,6 | 532 |
| 1989 | 5700 | 12,1 | 471 |
| 1990 | 6400 | 12 | 533 |
| 1991 | 6600 | 12 | 550 |
| 1992 | 5800 | 12,4 | 468 |
| 1993 | 4740 | 12,8 | 370 |
| 1994 | 4460 | 12,9 | 346 |
| 1995 | 4774 | 12,7 | 376 |
| 1996 | 4492 | 12,5 | 359 |
| 1997 | 4287 | 11,6 | 370 |
| 1998 | 4841 | 11,3 | 428 |
| 1999 | 4656 | 11,1 | 419 |
| 2000 | 4880 | 10,7 | 456 |
| 2001 | 6131 | 10,6 | 578 |
| 2002 | 7731 | 10,6 | 729 |
| 2003 | 6055 | 10,5 | 577 |
| 2004 | 5603 | 10,2 | 549 |
| 2005 | 6208 | 10,1 | 615 |
| 2006 | 6752 | 9,9 | 682 |
| 2007 | 6640 | 9,7 | 685 |
| 2008 | 6272 | 9,6 | 653 |
| 2009 | 5969 | 9,6 | 622 |
| 2010 | 5809 | 8,5 | 683 |
| 2011 | 9737 | 8 | 1217 |
| 2012 | 7738 | 8 | 967 |
| 2013 | 10054 | 8,7 | 1156 |
| *2014 | 5030 | 8,7 | 578 |

## Ráfiskaprísir

| | Sm. Trolarar | St. Trolarar | Línuskip |
|---|---|---|---|
| 1994 | 4,39 | 7,24 | 8,38 |
| 1995 | 5,33 | 6,69 | 7,89 |
| 1996 | 5,32 | 8,09 | 7,65 |
| 1997 | 5,94 | 8,61 | 8,49 |
| 1998 | 7,17 | 9,51 | 10,89 |
| 1999 | 6,86 | 9,75 | 13,25 |
| 2000 | 7,3 | 10,86 | 14,43 |
| 2001 | 6,63 | 9,76 | 15,61 |
| 2002 | 6,3 | 8,72 | 13,22 |
| 2003 | 5,01 | 10,2 | 12,66 |
| 2004 | 4,9 | 10,27 | 10,88 |
| 2005 | 4,64 | 10,17 | 12,76 |
| 2006 | 5,97 | 9,11 | 14,71 |
| 2007 | 6,05 | 9,36 | 16,44 |
| 2008 | 5,6 | 9,43 | 13,99 |
| 2009 | 5,8 | 9,35 | 9,95 |
| 2010 | 7,33 | 9,85 | 11,75 |
| 2011 | 8,48 | 7,16 | 12,56 |
| 2012 | 7,49 | 8,57 | 12,45 |
| 2013 | 5,91 | 5,89 | 10,99 |
| 2014 | 8,52 | 15,3 | 12,42 |

| **Hækking/lækking** | | | |
|---|---|---|---|
| 1994-2014 | 94 | 111 | 48 |
| 2012-2014 | -48 | -53 | -33 |
| 2013-2014 | -31 | -62 | -12 |


Ráfiskaprísir
18
16
14
12
10
8
6
4
2
0
1994
1995
1996
1997
1998
1999
2000
2001
2002
2003
2004
2005
2006
2007
2008
2009
2010
2011
2012
2013
2014
Sm. Trolarar
St. Trolarar
Línuskip


Avreiðingarprísir 2004 - 2014
3000
2500
2000
1500
1000
500
0
2004
2005
2006
2007
2008
2009
2010
2011
2012
2013
2014
Toskur
Hýsa
Brosma
Longa
Upsi
Kongafiskur
Blálonga
Svartkalvi < 3 kg